# Eg hevði viljað gj

**PREMIER LEAGUE DEBUT** Tað var trupult at hoyra nakað fyri teimum 60.000 áskoðarunum. Hann heldur, at hann skuldi havt rakað sær áðrenn dystin. Og telefonin hjá honum gløddi eftir dystin. Les her, hvussu fyrsti føroyski fótbóltsspælarin í Premier League upplivdi stóru løtuna leygardagin, og les eisini hvat venjarin segði við Gunnar Nielsen, tá hann skuldi á vøllin




Tróndur Arge

Leygarkvøldið hendi tað so endiliga! Ein føroyskur fótbóltsspælari spældi á fyrsta sinni í dysti í Premier League – ensku fótbóltskappingini, sum verður roknað sum tann sterkasta í heiminum.

Tá dysturin á Emirates Stadium í London ímillum Arsenal og Manchester City var 70 minuttir gamal, tveitti málmaðurin hjá Manchester City, Shay Given, seg og meiddi sær økslina. Beinanvegin tað gjørdist greitt, at skaðin var álvarsamur, leitaðu upptøkutólini á bonkin hjá Manchester City upp og niður fyri at finna hendan vælsignaða Nielsen, ið nú skuldi kastast fyri leyvurnar, just sum Arsenal væntandi fór at leggja stóra trýstið á Manchester City.

Tað gekk bara ein løta, so stóð hann har. 193 sentimetrar høgur, eitt sindur frísutur og órakaður í gulu málmanstroyggjuni við 37-talinum á rygginum. Andlitsbráið á hesum unga manninum vísti tó, at tað skal meiri enn eitt fullsett Emirates Stadium til fyri at ræða hann.

Løtu seinni kom so løtan, ið fótbólts-Føroyar hava bíðað so leingi eftir. Eftir eina stutta samrøðu við venjaran, Roberto Mancini, rennir Gunnar Nielsen inn á vøllin sum tann fyrsti føroyingurin í Premier League nakrantíð!

– Fyrst hugsaði eg, um Shay Given bleiv klárur aftur ella ikki. Síðani hugsaði eg, er tað nú? Eg fór so at hita upp og rann eitt sindur aftur og fram. Sum tíðin gekk, sá tað meira og meira út sum, at skaðin var álvarsamur. Síðani róptu allir á bonkinum eftir mær, og søgdu at eg skuldi inn, sigur Gunnar Nielsen um løtuna, áðrenn hann kom inn.

## 60.000 hugdu eftir mær

Hetta er fimtu ferð, at Gunnar Nielsen er við í hópinum hjá Manchester City. Fyrstu ferð var í FA Cup ímóti Scunthorpe. Hinir hava allir verið í Premier League. Fyrst á útivølli ímóti Burnley, síðani á heimavølli ímóti Birmingham og Manchester United og so nú ímóti Arsenal.

– Sjálvandi var eg spentur, men eg hevði fyrireikað meg væl áðrenn dystin. Eg legði sjálvandi merki til, at hetta var stórt, men eg segði bara við meg sjálvan, at eg skuldi verða fokuseraður og gera eitt ordiligt arbeiði. Eg var so róligur, sum tú eina ferð kann verða í eini slíkari støðu, sigur Gunnar um løtuna, tá tað gjørdist greitt, at hann skuldi inn.

Gunnar var róligur, tá hann kom á vøllin. Tað sást ikki á honum, at hetta var fyrsti dysturin hjá honum í Premier League.

– Stemningur á vøllinum var ógvuliga intensur, og tað var trýst á. Har sótu 60.000 áskoðarar og hugdu eftir mær, tá eg kom inn, men eg var øgiliga fokuseraður og royndi bara at hugsa um dystin, sigur Gunnar.

## Ringt at hoyra nakað

Gunnar fekk beinanvegin høvi at royna seg, tí Arsenal hevði hornaspark, tá hann kom inn. Tvær tær fyrstu avbjóðingarnar hjá Gunnari vóru tvey innlegg úr høgru síðu. Tað fyrsta loftaði hann væl, og tað seinna sló hann upp um tvørstongina. Eisini boksaði hann væl burtur, tá Arsenal sendi frísprark innfyri úr vinstru.

– Eg helt at tað gekk fínt. Tað, sum eg hevði at gera, tók eg mær av, so eg eri sum heild væl nøgdur við innsatsin, sigur Gunnar um avrikið hjá sær teir 22 minuttirnar, hann var á vøllinum.

– Tað er ringt at hoyra nakað á vøllinum, men vit fingu sagt tey týdningarmiklastu tingini við hvønn annan. Eg venji fast við hesum monnunum, so vit høvdu ongar trupulleikar við at skilja hvønn annan, sigur Gunnar.

Tá tíðin var farin átta minuttir út um vanliga leikið, bríksladi dómarin, Mike Dean, dystin av.

– Eg hevði gjarna viljað havt eina bjarging, men tað var eisini ein lætti, tá hann bríksladi av, tí nú hevði eg hildið nullið í fyrsta dystinum. Tað var ein ótrúlig gleði, eg kendi á mær eftir dystin, sigur Gunnar um seinasta brísklið í dystinum.

## Venjarin gav ráð

Beint áðrenn Gunnar fór á vøllin, fór venjarin, Roberto Mancini, yvir til Gunnar og gav honum nøkur góð ráð við á vegnum.

– Hann segði bara, at eg skuldi taka tað róligt og vera róligur við útspørkunum og tryggja mær, at liðið var komið fram á vøllin, áðrenn eg sparkaði út. Tað var tað, hann segði